# Reglur

## um tilmelding av sjálvlesandi og um samsýning til próvdómarar og skúlastjórar

**§ 1.** Persónur, ið hevur fylt 18 ár, kann í høvuðsroyndarskeiðinum mai/juni melda seg til próvtøku sum sjálvlesandi í seinasta lagi 1. februar.

**§ 2.** Til munnligu próvdømingina verða 2 próvdómarar útnevndir - ein 1. próvdómari og ein 2. próvdómari. 1. próvdómari verður útnevndur av skúlastjóranum í tí skúla, har próvtøkan fer fram. 2. próvdómari verður útnevndur av Landsskúlafyrisitingini. 1. próvdómari er yvirhoyrari (lærari).

**§ 3.** 1. próvdómari fær í samsýning 3 tímar fyri 1. yvirhoyring í eini lærugrein. Síðan fær hann 2 tímar fyri hvørja yvirhoyring í somu lærugrein á sama stigi. Í hesar tímar er roknað:

1. Vegleiðing við val av pensum
2. Kunning um ta skrivligu og ta munnligu royndina
3. Próvdøming

**§ 4.** 2. próvdómari fær í samsýning: talið av yvirhoyringum at býta við 3 = lønartímatalið. Tó verður altíð í minsta lagi 1 lønartími útgoldin.

**§ 5.** Skúlastjórin, ið hevur ábyrgd av próvtøkuni og skipar fyri henni, fær fyri hetta arbeiði 2 lønartímar; aftur at fær hann talið á samlaðu yvirhoyringum at býta við 3 = lønartímar.

**§ 6.** §§ 3, 4 og 5 eru somuleiðis galdandi, um persónur, ið hevur meldað seg til próvtøku, ikki møtir.

**§ 7.** Ferðaútreislur verða endurgoldnar eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri tænastuferðir fyri landsins tænastumenn.

**§ 8.** Skrivlig próvdøming til fráfaringarroyndir fólkaskúlans fyri sjálvlesandi verður goldin eftir somu reglum, ið galdandi eru fyri skrivliga próvdøming til fráfaringarroyndir fólkaskúlans.

**§ 9.** Løn fyri munnliga próvdøming av sjálvlesandi verður útgoldin sambært sats 24.4 í lærarалønunum.

**§ 10.** Henda semja, ið er gjørd millum Føroya Lærarafelag og Landsskúlafyrisitingina, er galdandi frá 1. august 1986 og kann sigast upp við 3 mánaða ávaring tó í fyrsta lagi til 1. august 1988.

Landsskúlafyrisitingin, 17. februar 1987

Fyri Føroya Lærarafelag — Hans T. Henriksen

Fyri Landsskúlafyrisitingina — Hensar Ellingsgaard